

Mynd: BP

# Tørvurin á olju kemur at økja

**Jógvan Hugo Gardar**

27.10.2015 - 14:44

Oljan.fo

Í farnu viku komu granskarar við eini frágreiðing sum vísir at tørvurin á olju kemur at økja, og tørvurin er enn hægri í 2030 enn hann er í dag, sjálvt um vit fylgja ST-málunum um veðurlagsmálini.

Fyri Karl Eirik Schjøtt-Pedersen, stjóra í Norsk olje og gass, eru hetta ikki nøkur nýggj tíðindir.

Í samrøðu við Dagens Næringsliv sigur hann at hatta hevur hann vita leingi. Hann sigur at tað sum granskararnir nú siga er tað sum oljuvinnan hevur vita leingi.

- Tað orðaskifti vit hava havt her í Noregi, har einstøk tosa um at Noreg eigur at gevast við at framleiða olju, tað merkir at oljuframleiðslan má flytast til lond har útlatini eru hægri enn hjá okkum, sigur Schjøtt-Pedersen.

- Umhvørvisfelagsskapir siga ikki satt. At vit hava brúk fyri meir olju og gassi í árunum sum koma, tað er nakað sum øll sum eru upptikin av orku hava vita leingi, sigur hann.